## Gott hálvár hjá Føroya Tele

Føroya Tele sendi týsdagin út tíðindaskriv, har úrslitið fyri fyrra hálvár varð fráboðað.

Samanlagt varð talan um eitt úrslit á 21,9 mió kr., og er hetta væl betri enn fyrra hálvár í fjør. Tá var úrslitið 7,6 mió kr., men í tíðindaskrivinum verður sagt, at hesi úrslit ikki eru sambærlig, tí fleiri eingangskostnaðir ávirkaðu roknskapin í fjør.

Nettosølan er í fyrra hálvárið økt við 2%, og stavar økta serliga frá breiðbandi og eini øktari sølu hjá Televarpinum.

Í tíðindaskrivi sigur Andras Róin, stjóri, at felagið er væl nøgt við gongdina higartil í ár. Mett verður, at ársúrslitið hjá Føroya Tele fer at liggja um 40 mió kr. eftir skatt.

-jm

## Javnvág hjá Televarpinum

Eisini Televarpið læt í týsdagin sín hálvársroknskap úr hondum, og fyri fyrstu ferð sýnir hesin eitt yvirskot.

Talan er ikki um tað heilt stóra yvirskotið, men úrslitið á 10.000 kr. er ein betran á 760 tkr. sammett við fyrra hálvár í fjør. Og við hesum er fyribils málið um at fáa javnvág í roknskapin rokkið.

Í tíndaskrivinum verður sagt, at haldaratilgongdin hjá Televarpinum hevur verið støðugt vaksandi, og at talið av haldarum nú er farið upp um 4.600.

Saman við framdu útbyggingunum av sendinetinum merkir hetta, at leiðslan á Televarpinum metir, at útlitini fyri yvirskoti á rakstrinum fyri 2005 eru góð.

Í tíðindaskrivinum sigur Laila Hentze, stjóri, , at Televarpið nú hevur prógvað, at tað ber til at reka eitt talgilt sendinet á handilsligum grundarlagi. Tað er ein stór avbjóðing at byggja eitt sendinet í einum fjallalandi, sum harafturat hevur ein sera avmarkaðan marknað, og so samstundis fáa vinning burtur úr íløgunum. Hetta setur eyka krøv til handilsliga konseptið, og tí hava eisini fleiri lond sýnt Televarpinum stóran áhuga, sigur stjórin.

-jm

# 50.000 kr. í hjálp til Niger

**Higartil eru savnaðar inn omanfyri 10.000 kr. til neyðhjálpina í afrikanska landinum Niger. Umframt hetta hevur Reyði Krossur Føroya longu sent 50.000 kr. til hesa hjálpina**



*Ógvusligar myndir av neyðini í Niger. Føroyingar hava enn einaferð tikið løgvatak fyri at hjálpa hesum hungursraktu fólkunum*

*(Mynd: Reuters)*

NEYÐHJÁLP

*Snorri Brend*

**Niger:** Tað vóru ræðandi tíðindi og myndir, sum herfyri bórust um hungursneyðina í afrikanska landinum Niger.

Vit sóu svøltandi børn og ørkymlaðar mammur, sum stríddust fyri at geva børnum sínum ta dagligu máltíðina.

Sum myndirnar vístu, so var talan um veruliga hungursneyð, tí bæði børn og vaksin liðu nógv undir, at eingin matur er til øll hesi fólkini.

Føroyingar hava eisini víst góðan vilja til at hjálpa hesum fólkum, og hevur m.a. Reyði Krossur sett sær fyri at savna inn væl av peningi til hesa neyðhjálpina.

Fyri fáum døgum síðani varð talt upp, og tað vísti seg, at higartil eru savnaðar inn 10.100 kr. kring landið. Fyrst í næsta mánaði er ætlanin at taka málið um neyðhjálpina upp aftur, og síðani senda enn meiri pening til Niger.

### Óheppin gongd

Aðalskrivarin í danska Reyða Krossi, Jørgen Poulsen er júst afturkomin av ferð í hungursrakta Vesturafrika.

Og hann ávarar um gongdina í landinum:

- Í teimum økjunum í Niger har vit vitjaðu, eru fólk byrjað at selja av ognarlutum sínum og leita sær nú til býirnar fyri at finna føði.

- Tá fólk eru so mikið úthungrað, soleiðis sum vit sóu tað, so skilja vit at tey fara til býirnar. Men eru fólk fyrst farin frá djórum og akrum sínum, er tað sera trupult at hjálpa teimum aftur til lívið, sigur Jørgen Poulsen.

Altjóða Reyði Krossur hevur júst fingið í lag eina avtalu við ST um at býta út mat til 230.000 fólk aftrat í Niger.

Higartil hevur felagsskapurin mest vent sær til 23.000 av teimum mest hungraðu børnunum og foreldrum teirra.

Henda nýggja uppgávan vísir enn einaferð tann stóra tørvin á hjálp:

- Vit vænta at vit longu hava savnað inn eina millión. Men tørvur er á nógv størri stuðli, um vit skulu kunna hjálpa øllum, sigur hann.

# Dartkapping í Glitnum

DARTKAPPING

Dartkapping verður í Glitnum komandi leygardag kl 13. Seinasta freist at tekna seg er fríggjadagin í barrini.

Hølini eru er gjørd út til kappingina soleiðis, at bæði tey sum luttaka og gestir annars kunnu kenna seg væl.

Seinasta dartkappingin var sera valumtókt, siga tey úr Glitnum.

# Bitland-verkætlan gerst veruleiki

**Fyrsta verkætlanin hjá Bitland á menningarstigi, verður at gera eitt talgilt undirstøðikervi, sum øll virðisketan í føroysku fiskivinnuni, frá grunni at munni, kann brúka og fáa gagn av**

VINNUTÍÐINDI

*www.industry.fo*

Tann elektroniski motorvegurin gevur millum annað møguleika fyri talgildum ketusporføri longu á sumri 2006. Skipanin kann nýtast til alt talgilt samskifti í føroysku fiskivinnuni umframt at tað almenna fær betri og skjótari hagtøl.

### Til prentingar

Bitland hevur síðan byrjan arbeitt við nógvum ymiskum verkætlanum á nógvum ymiskum økjum. Longu í 2003, tá Bitland bert varð ein undanverkætlan, varð fyrsta tiltakið um digitalt sporføri hildið. Tá bleiv staðfest at innan talgilt sporføri, hava Føroyar allar fortreytir og góðar møguleikar at gerast undangongu land. Føroyar hava altíð verið væl við, tá talan hevur verið um at skjalprógva lógarkravt sporførið og sporførið, sum marknaðurin hevur eftirspurt. Við komandi talgildu sporføriskipan er møguleiki fyri, at Føroyar blíva fyrsta land í heimunum, har sporførið verður skjalprógva talgilt, um kundarnir ynskja tað. Fleiri ábendingar eru um, at tað verður eitt framtíðar marknaðarkrav.

Í seinastu viku bleiv menningarætlanin sjósett við avtalu millum Bitland, Ráfiskakeyparafelagið og Fiskimálaráðið. Bitland kemur at hava prosjektleiðsluna í fyrsta stiginum, sum umfatar kravfesting av allari skipanini.

Í fyrireikingararbeiðinum hava, umframt Fiskimálaráðið, Ráfiskakeypara- og Ráfiskaseljarafelagið, eisini tey føroysku KT virkini, sum eru KT veitarar til fiskivinnuna, luttikið. Arbeitt verður fram í móti, at fáa kravfestinararbeiðið liðugt innan 1. november í ár, soleiðis at avtala kann gerast við veitara av skipanini í hesum árinum. Longu 1. mai 2006 skal skipanin royndarkoyrast, og 1. august verður hon so alment tikin í nýtslu. Samstundis sum kravfestinararbeiðið ferð fram, skal arbeiðast við at skipa eitt felag, sum skal eiga og reka skipanina.

Eitt felags talgilt undirstøðikervi letur upp fyri nógvum møguleikum. Eitt er talgilt sporførið, men væntast kann at hetta, sum frá líður, bert verður ein lítil partur av skipanini. Av tí at talan verður um at endurnýta dáta, soleiðis at tey bert verða skrivaði inn á teldu einaferð, eru møguleikar fyri effektiviseringum og rationaliseringum í øllum virkjum í virðisketuni umframt í áhugafeløgum og almennum stovnum, sum fáa elektronisk dáta frá fiskivinnuni.

Eitt sera týðandi evni í menningini er trygdin og ognarviðurskiftini til dáta, sum verða latin inn í skipanina. Viðvíkjandi ognarviðurskiftunum til dátunar verður meginreglan, at hann sum letur dáta inn í skipanina eigur dátunar og avgerð sjálvur hvør fær atgongd til dátunar.

Uppá sikt verða væntandi fleiri skipanir mentar av KT fyritøkum, sum fara at endurnýta dátur úr talgilda undirstøðikervinum, til dømis avreiðingarskipan, tollingarskipan til útflutning av fiski, avrokningarskipan og talgildar veiðudagbøkur til bátar og skip.

## Kristin marathonkonsert

**3. september verður fyri fyrstu ferð skipað fyri Fock Praise Marathon - RPM.. Hetta verður gjørt í Kelduni í Skálafirði**

RPM

*Tíðindaskriv*

Tan 3 Sept. 2005 kl. 17.00 Fer eitt spildurnýtt tónleika tiltak av bakkastokki í Kelduni í Skálafirði, talan er um eitt Rock Prais Marathon, ella stytt RPM, sum byrjar kl. 17.00 og skal koyra út í eitt fram til kl. 02.00 um náttina. Bólkarnir sum luttaka umboða alla breiddina innan kristnan tónleik í Føroyum, og eru teir hesir: Proclaim, Holygans, Heini Lutzen, Purpur, Mush Mellows, Braquet, I Am og Direct level, umframt hettar verða eisini dansiframførðslur og lovsangur. Fyrireikarir av tiltakinum eru ADORE MUSIC, sum hevur fyrireika fleiri tiltøk av tílikum slag seinastu árini, m.a. kann nevnast konsertin við Svenska rockbólkinum, Narnia sum var sera væleydnað.

Endamálið við tiltakinum er fyrst og fremst at boða gleðiboðskapin á henda hátt, og harnæst at savna tann kristna tónleikin í Føroyum til eitt felags tiltak.

Øll eru hjartaliga vælkomin til tiltakið, og verða atgongumerkir seld við dyrnar 1 tíma áðrenn tiltakið byrjar.

Fyrireikarirnir vóna at tiltakið fær góða undirtøku, og at høvi verður nýtt til at stuðla Føroyskum kristiligum tónleiki á hendan hátt.